gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Kasparov, Todi og EB/Streymur

Hetta hevur verið eitt hendingarríkt vikuskifti, tá tað um ítrótt og kapping umræður. Føroyar fingu vitjan av heimsins mætasta telvara, Garry Kasparov, Føroya besti fótbóltsspælari, Todi Jónsson gjørdist Danmarkarmeistari, og nýggja liðið í 1. deild, EB/Streymur tók øll á bóli, tá liðið vann á KÍ á Norðoyarstevnu.

Tað er fyrst og fremst breiddin tvs. luttakaraskarin, ið er grundarlagið undir ítróttarvirkseminum. Men tað eru einstøku úrslitini,sum kveikja og geva íblástur. Hetta hevur nú farna vikuskiftið prógvað.

Fyrrverandi heimsmeistarin Garry Kasparov kom til Føroya fríggjadagin. Telvaði á Norðoyarstevnu móti 25 føroyingum í senn. Vann á teimum 24 men tapti heldur óvæntað móti unglingameistaranum úr Kollafirði. Sunnudagin leikti hann móti landsliðnum fyri einum fullum Norðurlandahúsi. Vann fýra av talvunum, tvey endaðu javnt. Ikki kann sigast annað enn, at okkara telvarar her sýndu gott spæl. Í Norðurlandahúsinum var annars hátíðardámur. Vælmannað kór í føroyskum búna gjørdi løtuna kensluborna, ikki minst tá sungið varð á móðurmáli Kasparov. Mentamálaráðharrin helt mergjaða røðu, har hann samanbar talv við list. Samanumtikið væl fyriskipað. Ongin ivi er heldur um, at talvungdómar í Føroyum, sum vóru saman við Kasparov sunnumorgunin, hava fingið gott í beinið og íblástur.

Hin stóra ítróttarliga hendingin fór fram í Keypmannahavn, har "liðið hjá Toda" gjørdist danskur meistari. Hóast føroyska stórtalentið Todi Jónsson ikki spældi við avgerandi dystin vegna skaða, eigur hann stóran part av heiðurinum fyri, at FCK gjørdist meistari. Gullbein hansara eiga flestu málini hjá liðnum. Við hesum sigri sleppur Todi skjótt at royna seg í europeisku kappingunum, og kann tað verða tað "gjøgnumbrotið", sum bóltsnillingurin úr Klaksvík og vit øll hava bíðað eftir. Eingin ivi er um, at boð verða eftir Toda, tá hann sleppur at vísa kynstur og evni síni á leikvøllum í Europa. Hann hoyrir heima á bestu liðum í Europa. Nú er tað bara tíðin, sum skal arbeiða fyri honum. Og við altjóða royndum fara vit helst at síggja Toda aftur á landsliðnum. Tí er DM-heitið hjá Toda eisini eitt slag av marknaðarføring og byrjan til eitt betri føroyskt landslið í framtíðini.

Sum rossinan í pylsuendanum tók nýggja liðið í 1. deild EB/Streymur øll á bóli, tá tað vann á KÍ á Norðoyarstevnu. Eisini tað er ein stórhending í ítróttinum hetta vikuskiftið, og uttan iva nakað, sum fløvar í heimliga umhvørvinumí Eysturoynni. Hetta úrslit vísir bara, at tað grør um gangandi fót í fótbólti og stórbýarliðini skulu als ikki kenna seg ov trygg. Við hesum tillukku til Kasparov, Toda og EB/Streym.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sosialurin og sannleiki

**Høgni Hoydal**
*Formaður í Tjóðveldisflokkinum*



**Onki lyfti er brotið og onki skeivt er farið fram viðvíkjandi valum av landsstýrismonnum hjá Tjóðveldisflokkinum. Sosialurin hevur óteljandi ferðir skrivað hetta á forsíðu og í yvirskrivtum – hóast blaðið skrivliga hevur fingið bjóðað innlit í alt málið og kundi havt skrivað sannleikan.**

**Sostatt ber Sosialurin skeiv tíðindi, hóast blaðið hevur allar møguleikar at lýsa málið til fulnar.**

Undirritaði fer ikki at gera viðmerkingar til úttalilsir ella greinar hjá Signari á Brúnni. Tað er demokratiski rættur hansara at siga tað, sum honum liggur á hjarta. Eg fari ikki út í eitt orðaskifti um persónar.

Politiskt arbeiði snýr seg ikki fyrst og fremst um persónar. Tað snýr seg um at stríðast fyri eini hugsjón, at taka avgerðir og at fara rætt, reiðiliga og demokratiskt fram, tá avgerðir verða tiknar.

Tíbetur kann eg siga, at soleiðis hevur verið viðvíkjandi teimum valum, ið eru tikin viðvíkjandi landsstýrismannaskiftum hjá Tjóðveldisflokkinum í hesum valskeiðnum.

Sosialurin hevur tó sum tíðindamiðil fleiri ferðir borið beinleiðis skeiv tíðindi um hesi mál, og hevur tíverri ikki viljað rættað síni ósannindi.

Tí verður hendan rættleiðing gjørd.

**Einmæld avgerð**

Tað var ein virðilig avgerð, tá undanfarni landsstýrismaður legði frá sær og bað um ein kanning av sjónvarpsmálinum. Ein avgerð, sum bygdi á, hvat var best fyri álitið á politisku skipanina, og hvat var best fyri politiska arbeiðið hjá Tjóðveldisflokkinum og arbeiðið í landsstýrinum.

Tá kanningin dróg út, varð eisini beinanvegin viðgjørt, hvat nú var best fyri Tjóðveldisflokkin og arbeiðið í landsstýrinum, har ein landsstýrismaður røkti tvey stór málsøki. Undirritaði mælti til, longu tá nakrar vikur vóru lidnar, at best var at velja nýggjan landsstýrismann, men legði dent á at tosa við fráfarna landsstýrismannin fyrst, og at hann skuldi góðkenna, at hetta varð gjørt.

Eftir nógvar samrøður millum undirritaða og fráfarna landsstýrismannin og eftir viðgerð í tingbólki og floksstjórn Tjóðveldisfloksins, var tað ein einmæltur tingbólkur (harundir fráfarni landsstýrismaðurin), ið gjørdi av, at nýggjur landsstýrismaður átti at veljast fyri restina av valskeiðnum. Tí tað gagnaði flokkinum best í teirri støðuni.

Sostatt er onki lyfti brotið ella nakað skeivt farið fram.

**Sama søga aðru ferð**

Tað var ein virðilig avgerð, tá næsti landsstýrismaðurin valdi at leggja frá sær. Ein avgerð, sum bygdi á, hvat var best fyri álitið á politisku skipanina, og hvat var best fyri politiska arbeiðið hjá Tjóðveldisflokkinum og arbeiðið í landsstýrinum.

Tjóðveldisflokkurin viðgjørdi síðani, hvat best var at gera í hesi støðu, og valið fall á at velja ein nýggjan landsstýrismann restina av valskeiðnum.

Sjálvandi kann ónøgd vera við tey val og tær avgerðir, ið fara fram í einum stórum flokki – og tað hevði verið løgið annað.

**Sosialurin ber ósonn tíðindi**

Men Sosialurin hevur eftirhondini fleiri ferðir skrivað sum tíðindamiðil – bæði á forsíðuni og í yvirskrivtum - um at lyfti eru brotin og at Tjóðveldisflokkurin og undirritaði skulu hava svikið nakran. Hvørja ferð hevur Sosialurin fingið at vita, at eg ikki ynski at fara í eitt persónsstríð, men um blaðið ynskir at kanna málið og at finna sannleikan, so eru blaðfólkini vælkomin at síggja fundarfrágreiðingar og annars at spyrja øll, sum hava verið við í viðgerðini.

Hetta hevur blaðið ikki ynskt, og hevur sostatt ikki fylgt nøkrum journalistiskum reglum um at lýsa eitt mál til fulnar. Tí ber Sosialurin beinleiðis ósonn tíðindi, hóast blaðið hevur allar møguleikar at lýsa veruleikan.

**Betri uppiborið**

Tað er harmiligt og vánaligt móti øllum pørtum. Eg haldi, at Tjóðveldisflokkurin og landsstýrisumboð hansara hava roynt at tikið skilagóðar avgerðir og hava tikið avleiðingar av málum, ið skapa trupulleikar fyri at fremja politikk. Ongin av teimum landsstýrismonnum, ið hava lagt frá sær, hava gjørt nakað ólógligt ella persónliga illgrunavert. Men hava kortini gingið undan fyri at skapa álit á politisku skipanina (nær er tað hent áður í føroyskum politikki?).

Tí haldi eg eisini, at bæði persónarnir og Tjóðveldisflokkurin hava betri uppiborið, enn at gerast lutur í yvirskrivtum og tíðindagreinum í einum blaði, sum onki hava við sannleikan ella við reiðiligan journalistikk at gera.

# Sosialurin skerdur í síðutali

PRENTÚTBYGGING
*Blaðstjórnin*

Hesa vikuna verða prentmaskinurnar á Prentmiðstøðini, sum Dimmalætting og Sosialurin eiga í felag, útbygdar. Hetta merkir, at Sosialurin í hvussu so er í eina viku ikki kann prentast í fleiri enn 32 síðum, eins og at litsíðurnar verða skerdar.

Av hesi orsøk er tað trupult hjá okkum at fáa alt tilfarið við til tíðina, og mugu eitt nú fleiri ítróttarsíður, sum skuldu verið í blaðnum í dag, bíða. Tað sama er galdandi fyri innsent tilfar. Vit vilja í hesum sambandi heita á fólk, ið vilja hava innsent tilfar við í blaðið, um at skriva stutt og greitt. Best er um vit fáa tilfarið teldutókt, annahvørt sum teldupost ella á diskli. Men til ber eisini at senda okkum bræv ella faks. (Adressur og faxnummar síggjast í kolofonini niðanfyri).

Tá prentsmiðjan er liðugt útbygd, verður prentgóðskan munandi betri, fleiri síður kunnu prentast í liti – og síðutalið kann økjast.

Vónandi bera lesarar og lýsarar yvir við avmarkingunum.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Hvar var so hasin farrin av saklighet?

**Jóannes Eidesgaard**



Javnaðarflokkurin helt tíðindafund seinasta fríggjamorgun, har vit løgdu fram tær framskrivingar fyri búskaparligu avleiðingarnar av loysingini, sum flokkurin hevur fingið gjørt saman við fólki við servitan um búskap. Vit hava í longri tíð arbeitt við hesum spurningi, tí vit kenna tað sum okkara skyldu at greiða fólki frá, hvussu vit meta fylgjurnar verða av loysingarætlanini hjá landsstýrinum. Og hesa skyldu kenna vit dupulta, tí landsstýrið, sum annars eigur próvskylduna, ger alt fyri at dyla, hvørjar avleiðingarnar verða av loysingini, men fyrigykla í staðin fyri fólki, at eftir loysingina verður als einki mark fyri, hvussu alt fer at blóma, eisini tann búskaparligi parturin.

Høgni Hoydal hevur við hvørt høvið, sum býðst, eftirlýst bert einum farra av saklighet, tá aðrir enn fullveldismenn hava dittað sær at tikið til orðanna. Men seinasta fríggjakvøld hevði hann møguleikan at vísa okkum, hvat tað er, hann meinar, tá hann tosar um saklighet. Men vit sóu ikki so mikið sum eitt brá av saklighet, tvørturímóti.

Var tað so tí, at Høgni Hoydal ikki dugur at vera sakligur? Nei, so avgjørt ikki, tí tað dugur hann, tá hann vil, tað skal hann eiga. Men orsøkin var einføld tann, at Høgni Hoydal ikki hevði nakað at seta fingurin á í okkara framrokning, og tí var hansara einasta vápn at krúpa uttan um tað, sum sjálvt málið snúði seg um og síðan at kryddra tað við onkrari óndsinnaðari samantvinnan av gondini í 80'árunum. Ella var kanska orsøkin, at Høgni Hoydal als ikki hevði sett seg inn í okkara framrokningar?

Vit hava lagt okkum eftir, at arbeiðið skuldi vera fakliga so korrekt sum gjørligt, og í tí sambandi hava vit havt ein búskaparfrøðing við hollum royndum til at gera tann partin. Og vit eru til reiðar til eitt fakligt orðaskifti, um Høgni Hoydal ella aðrir bjóða seg fram.

Tað, sum er springandi punktið í øllum slíkum arbeiði, eru tær fyritreytir, tú leggur til grund fyri útrokningina og framskrivingina. Nú liggur á ljóði, at tað er óseriøst, tí at eitt rokniartk verður brúkt, men hetta er bert amboðið. Fakligi kvaliteturin liggur í, hvørjar búskaparligu fyritreytirnar eru. Hvussu stórur verður árligi búskaparligi vøksturin, og hvussu stórar verða árligu inntøkurnar, tað er tað altavgerandi.

Vit hava sett inntøkuvøksturin til 2% pr. ár, og er hetta eisini tað sama, sum aðrir búskaparfrøðingar meta er rætt, eisini búskaparfrøðingurin hjá landsstýrinum. Hetta er intøkuvøksturin í Føroyum seinastu 20 árini, og hetta er vøksturin, sum eyðkennir londini rundan um okkum. Hetta er tað OECD-londini brúka, tá tey meta um vøkstur.

Útreiðsluvøksturin hava vit sett til 1,5% pr. ár, meðan búskaparfrøðingurin hjá landsstýrinum hevur sett henda til 0,8%. Hvat er rætt ella ikki, er kanska ringt at meta um. Men vit hava undirbygt, hví vit so bjartskygd seta henda til 1,5%. Lønarsáttmálarnir, sum landsstýrið hevur gjørt, fer at merkja, at landskassaútreiðslurnar fara at økjast við árliga 1,95% komandi trý árini. Taka vit so vaksandi talið av pensjonistum komandi árini, so fer hetta einsamalt at merkja ein vøkstur upp á árliga 0,5%. Framkonu londini tykjast hava sera trupult við at halda vøksturin undir á leið 2%. Og vit eiga at minnast til, at kravið um hægru útreiðslurnar ikki bert verða stýrdar av okkum sjálvum. So uttan iva hava vit mett úteiðsluvøksturin alt ov positivt til stóran fyrimun fyri ætlan landsstýrisins, hann átti at verið hægri, og vit mugu tí bert staðfesta, at 0,8% vøksturin hjá landsstýrinum er púra órealistiskur. Taka vit gongdina í Føroyum seinastu trý árini, so hevur hesin ligið um 5% pr. ár. Útreiðslurnar eru jú vaksnar við 600 mió. kr. í trý ár, meðan henda samgongan hevur sitið.

Hin vegin so eru allir búskaprfrøðingar samdir um, at skal ætlanin hjá landsstýrinum yvirhøvur hanga bert nøkunlunda saman, so skulu útreiðslurnar helst als ikki økjast. Umframt at hetta er púra órealistiskt, so merkir hetta eisini, at føroyska samfelagið stagnerar og verður afturúrsiglt í mun til londini rundan um okkum. Fylgjurnar av tí kenna vit frá fyrst á 90'unum.

Tí harmar tað meg almikið, at fremsti talsmaður fyri loysingina ikki gevur okkara arbeiðið størri gætur annað en at siga, at vit framleiða eina svarta mynd, sum ger okkum bundnar av donskum stuðuli í allar ævir. Vit hava gjørt beint tað øvugta. Vit hava m.a. fyri at fáa eitt gott orðaskiftið um hesi viðurskifti, sett framrokningina upp so vælvilja mótvegis ætlanini hjá landsstýrinum sum gjørligt, men opinbart kann tað eisini gera tað sama, tí Høgni Hoydal hevur frammanundan tikið ta støðu, at alt sum kemur frá okkum er skeivt og misvísandi.

Men Høgni Hoydal hevði so onga sakliga og enn minni fakliga atfinning at okkara framrokning, sum týðiliga og greitt sigur, at føroyskur búskapur við hesari gongd fer at resta góðar 6 mia. kr. í eftir 12 árum. Hann hevði ikki eina atfinngin at teimum fyriteytum, vit høvdu sett, so summa summarum má so verða, at maðurin er settur skák í mát. Hevði innast inni vænta mær annað.

Reypið um, hvussu væl hevur gingist seinastu trý árini, tað er so hansara orð. Rætt er, at vit hava havt eitt ótrúligt viðrák, sum vit øll fegnast um. Men reypið minnir ikki heilt einki um, tá ein ávísur løgmaður tók sær æruna av, at fiskurin var komin aftur á grunnarnar. Og reypið um, hvussu væl landsstýrið hevur stuðlað vælferðarskipnunum og her serliga skúlanum, ja tað hava vit sjónlig prógv um júst í hesum døgum, føroyski fólkaskúlin og Læraraskúlin rópa eftir hjálp. Og hvussu var í fjør, tá føroyski fólkskúlanum fyri fyrstu ferð nakrantíð var í verkfalli í fleiri vikur. Hetta sigi eg ikki fyri at vera ósakligur, men tí at tað júst vóru hesi viðurskifti, Høgni Hoydal legði største dentin á í sínum viðmerkingum til okkara framløgu.

Tosið um útrokningar í 80'unum mugu so eisini standa fyri Høgnasa egnu sakliga trúvirði, men eg haldi hann fær trupulleikar við sama trúvirði, næstu ferð hann fer at eftirlýsa saklighet frá øðrum.

Eg fari at takka sjónvarpskvinnuni fyri viðkomandi spurningin um, hvørjum vit nú skulu trúgva. Og støðan er júst henda, at Føroya fólk ikki fær tað svarið, øll rópa eftir. Vit hava so við okkara framløgu givið teimum okkara svar. Og tað munnu vit uttan iva fara at hoyra meira um.

# Viðmerking til Høgna Hoydal

EIVIND JACOBSEN
*Strendur*



Tíðindamenn læra at lýsa eitt evni frá øllum síðum, fyri at lurtarin ella lesarin sjálvur kann gera av, hvat er rangt og rætt. Høgni Hoydal hevur lært, hvussu tú skalt siga tína søgu sum best, fyri at móttakarin skal trúgva tí, sum tú sigur og taka undir við tí, sum sagt verður.

Hetta dugir hann sera væl. Men talan er um einvegis kunning og ikki sakliga upplýsing. Hetta er tað tey í øðrum londum kalla propaganda.

Høgni Hoydal roynir av øllum alvi at mótprógva skilagóðum pástandum um búskap, sum búskaparfrøðingar og politiskir flokkar føra fram. Hetta verður gjørt á ein hátt, sum lítið sømir seg einum politikara.

**Ein maður - 4 meiningar**

Fyrst tosaði Høgni um, at avlopið á gjaldsjavnanum var nærum eins stórt og ríkisveitingin. Tá hetta ikki bar til, skifti hann evni. Nú bleiv ríkisveitingin samanlíknað við avlop hjá landskassanum. Tá hetta ikki ber til, samanlíknar Høgni avlop á fíggjarlóg og brúkta ríkisveiting við bruttotjóðarframleiðsluna.

Um mánaðarskifti kom so higartil seinasta samanlíkningin frá Høgna. Nú er hann farin at samanlíkna búskap við arbeiði. Nú er búskapurin livandi. Búskapurin er tað arbeiði, vit øll gera. Hetta er grundarlagið undir nútímans búskaparfrøði, sigur Høgni. Jú sanniliga sigi eg tykkum at so er. Men hetta er einki nýtt. Ein bók um sama evni bleiv skrivað í 1776, og verður hon framvegis brúkt í dag!

Men Høgni, tað broytir ikki upp á okkara máta at gera upp virðið av øllum arbeiðið, sum gjørt verður. Tað hevur verðið og verður framvegis gjørt upp í krónum og oyrum. Júst sum vit altíð hava gjørt! Vit brúka nevniliga krónur at umrokna við, fyri at arbeismaðurin og stjórin fáa løn. Teir gera báðir eitt arbeiði! Peningaskipan er tí ein náturligur partur, sum er til gagn fyri allar partar. Í besta kommunistastíli verður verkfall nevnt, og annars roynir Høgni seg sum arbeiðaravin. Í nútímans samfeløgum eru arbeiðarar og arbeiðsgevarar samstarvspartar. Ikki fíggindar sum vinstavend vilja verða við.

**Ríkisveitingin er 52% av Almennu inntøkunum**

Alt hetta broytur einki uppá tann veruleika, at ríkisveitingin er grundarlagið undir 40-60% av inntøkum hjá almennu kassunum og ikki 4% sum Høgni móti betrivitan sigur.

Um vit hyggja í Hvítubók á síðu 136 ella í Búskaparpartin á síðu 95-100, síggja vit, at ríkisveitingin er grundarlagið undir 52% av inntøkunum hjá tí almenna.

| Fruminntøkur 1997 | Í mió | Í % |
|---|---|---|
| Ríkisútreiðslur | 1288 | 52 |
| | | |
| Fiski- og flakavinnan | 1041 | 42 |
| Alivinnan | 76 | 3 |
| Landbúnaður | 12 | 1 |
| Ferðavinnan | 59 | 2 |
| Í alt | 2476 | 100 |

Hetta eru tøl, sum okkara bestu búskaparfrøðingar hava roknað út. Hetta sigur okkum eisini, at um vit taka burtur ríkisveitingina, verða umleið 52% minni krónur til hvønn einstakan. Eisini vísir Hvíta Bók okkum, at sjálvt tá best stóð til í Føroyum, og fiskiskapurin var í hæddini, var ríkisveitingin 40% av samlaða búskapinum.

Tí noyðist Høgni at góðtaka, at ríkisveitingin er grundalagið undir vælferðini í Føroym í dag. Tað sum vit í Føroym framleiða røkkur bert hálva leið. Tíverri er tað soleiðis, at tað sum vit framleiða sjálvi bert er 50% av tí vit brúka. Syrgiligt men, sambært Hvítu Bók, satt.

Tí er tað sera harmuligt, at Høgni blívur við at siga, at ríkisveitingin bert er 4% av búskapinum. Høgni veit, at hetta er at siga ósatt fyri fólki. Men okkurt skal gerast. Undirtøkan fyri loysing er ikki stór, og ein treyt fyri, at Høgni kann fáa vald yvir Palliba, er, at Palliba tekur loysing frá Nyrup. Bert spell at maktgirndin er størri enn umhugsni fyri Palliba.

Hjá teimum, sum í verki hava víst, at teir duga at brúka teir møguleikar, sum eru, er tað als ikki hugaligt at hoyra ungar menn, sum eru føddir við silvurskeið í munninum, siga, hvussu einfalt alt er. Helst tá tað einasta, teir duga, er oman fyri hálsvølin. Tað skal nógv meira enn føgur orð til at byggja land.

# Fyrilestur um meslingar, sjúkrahús og Møller kontrollør

FYRILESTUR
*søgu- og samfelagsdeildin:*

Fríggjakvøldið heldur Erling Isholm kandidatfyrilestur í søgu, ið hann kallar:

Meslingar, sjúkrahús og Møller kontrollørur. Avbyrgingarpolitikkurin og Føroyingahavnin. Fyrilesturin byggir á høvuðsritgerðina í søgu og siðsøgu: "Føroyingahavnin - fram til 1940"

Fyrilesturin verður hildin sum útvarpsfyrilestur og sendur í ÚTVARPI FØROYA fríggjadagin 15. juni kl. 19, sigur Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya.